# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 24. apríl 2012, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Evelyn Gaard, Jón Mikkelsen, Bárður Poulsen og Siri S. Niclassen.
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 68**
Tilmæli frá teknisku nevnd um vatntrupulleikar hjá Vagni Streymoy, Skálavegur 11.
J. nr. 2009-421

Nevndin mælir einmælt til at endurgjalda skjalprógvaðar útreiðslur upp til 9.000 kr., sum Vagnur hevur havt av gravingini ímillum hús hansara og grannahúsini á Skálavegi 13.

**Viðv. 68**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 69**
Tilmæli frá teknisku nevnd um fyrispurning frá Inga Durhuus um at fáa omankoyringina til grundstykkkið hansara, matr. nr. 309b ókeypis afturfyri útreiðslur hann sjálvur hevur havt orsakað av dálkaðari planering.
J. nr. 2009-145

Nevndin mælir til at ganga fyrispurninginum á møti, men at Ingi rindar fyri matrikuleringina.

**Viðv. 69**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 70**
Tilmæli frá teknisku nevnd um umsókn frá Elsu Klein Olsen um sundurbýti av matr. nr. 4b.
J. nr. 2009-456

Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 70**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 71**
Tilmæli frá teknisku nevnd um umsókn um sundurbýti og umskipan av matr. nr. 249f, sum P/F Mest leigar frá Vestmanna Kommunu.

Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 71**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 72**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um uppskot til fíggjarætlan fyri
Vestmanna Bókasavn fyri 2013.

Nevndin mælir til at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan fyri Vestmanna Bókasavn fyri 2013.

**Viðv. 72**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 73**
Val av einum limi í upptøkunevndina fyri røktarheimið í Vestmanna.

**Viðv. 73**
Karl A. Olsen, borgarstjóri, skjeyt upp at velja Herit Magnussen til lim og Evelyn Gaard til varalim.

Uppskotið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.15.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen

Jón Mikkelsen Evelyn Gaard Bárður Poulsen Siri S. Niclassen